# ítróttur

Nr. 240 • mikudagur • 14. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Bridgekalendarin klárar

**Liðkapping, Grand-Prix kapping og parakapping standa á skránni, nú Bridge-sambandið hevur lagt kappingardagarnar í 2006 til rættis**

**BRIDGE**
*Bogi Simonsen*



*Sum verandi fótbóltsbossur og fyrrverandi landst‡rismaður hevur Óli Holm mangan havt tørv á at spæla síni kort rætt. Í so máta man bridge-spælið vera góð venjing*

Kappingarárið hjá Føroya Bridge Samband fer av álvara í gongd í januar 2006, tá lagt verður fyri við liðkappingini.

Sum nakað nýtt, hevur kappingarnevndin hjá Føroya Bridge Samband avgjørt, at liðkappingin hjá 1, 2 og 3. deild skal byrja í januar. Vanligt hevur verið, at tey fyrstu umførini vóru leikt longu í november. Tey fyrstu umførini í ár verða leikt í skúlanum í Sørvági 13 og 14 januar 2006.

Freistin at boða frá luttøku til liðkappingina er fríggjadagin 6. januar 2006.

### Steypakappingin

Fyri tveimum árum síðani avgjørdi FBS, at broyta steypakappingina, soleiðis, at hon varð spæld sum ein miniliðkapping. Hendan broyting gekk ikki serliga væl, tískil verður kappingin broytt atfur til tann gamla háttin við cup-skipan. Eftir hesari skipan, verður lutakast millum øll tey tilmeldaðu liðini. Tað liðið, sum fyrst verður trekt hevur heimadyst og skal syrgja fyri at hesin verður spældur eftir galdandi reglum og innan ásettu tíðarfreist. Tá ið komi er fram til hálvfinaluna og sjálva finaluna, verður tað so FBS, ið skipar fyri dystinum.

Vinnarin av steypakappingini sleppur at umboða Føroyar í tí sera sterku Rottneros kappingini, ið verður spæld einaferð í mai 2006. Liðini, ið luttaka í hesari kapping eru steypavinnarar úr hinum norðanlondunum.

Freistin at boða frá luttøku til steypakappingina er 13. januar 2006.

**Skráin hjá Bridge-sambandinum fyri 2006 er annars hendan:**

| | | |
|---|---|---|
| 13. januar | FM-lið | Sørvági |
| 14. januar | FM-lið | Sørvági |
| 15. januar | Grand-Prix par | Sørvági |
| 3. februar | FM-lið | Eysturoy |
| 4. februar | FM-lið | Eysturoy |
| 5. februar | Grand-Prix par | Eysturoy |
| 24. februar | FM-lið | Tórshavn |
| 25. februar | FM-lið | Tórshavn |
| 26. februar | Grand-Prix par | Tórshavn |
| 17. mars | FM-lið | Klaksvík |
| 18. mars | FM-lið | Klaksvík |
| 18. mars | Veitsla við steypahandan | Klaksvík |
| 19. mars | Grand-Prix par | |
| 1. apríl | FM-par, hálvfinala | Tórshavn |
| 22. apríl | FM-par, finala | Tórshavn |

Stjørnan-StÍF 29-26 (13-11):

# Sterkur Stjørnu-bonkur

**Stjørnan spardi fleiri stuðulsspælarar, men vann kortini tryggan sigur á StÍF týskvøldið**

**SUNSET-KAPPINGIN**
*Jákup Mørk*

Næst seinasti dysturin í grundspælinum hjá kvinnum varð spældur týskvøldið, tá StÍF vitjaði hjá Stjørnuni.

Sum so var dysturin uttan nakran týdning, tí tað er longu greitt, hvørji fýra lið skulu spæla í FM-endaspælinum eftir jól. Somuleiðis siga reglurnar, at stigabýtið millum liðini tá aftur verður nullstillað, og tí kundi hvørgin parturin brúka ein møguligan sigur til nakað í so máta.

### Líktist stórsigri

Tað gav so eisini venjaranum hjá Stjørnuni møguleika at geva nakað av spælitíð til spælarar, sum vanliga ikki sleppa at gera so nógv um seg týskvøldið. Og fyri fleiri teirra var eisini galdandi, at tær tóku av møguleikanum. Ikki minst unga Louisa Andreasen, sum vanliga er backup hjá Joan M. Djordjevic. Joan fekk reytt kort, tá Stjørnan vitjaði hjá Neistanum sunnudagin, og tí var Louisa sum so í lyklastøðu til hendan dystin.

Í fyrra hálvleiki fylgdi StÍF annars væl við. Okkurt skifti vóru tær eisini á odda, men eftir steðgin gekk fyri tað mesta ein veg. Stjørnan royndi støðugt at økja um leiðsluna, sum eitt skifti var seks mál. Heilt sett trumf á fingu tær tó ikki, men sigurin var ongan tíð í vanda, og tí má staðfestingin vera, at eisini á beinkinum er Stjørnan í løtuni sterkasta liðið í landinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Stjørnan-StÍF 29-26 (13-11)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Louisa Andreasen 10(1), Ragna Patawary 5, Maria við Neyst 5, Durita Christoffersen 4, Rósa Lassen 2, Birita Joensen 1, Durita Mikkelsen 1, Diana Poulsen 1
**StÍF:** Poula D. Olsen 9(2), Rebekka Justinussen 6(1), Malan Petersen 2(1), Elin Jacobsen 2, Sólfríð Christiansen 2, Ata Gregersen 2, Johanna í Króki 1, Gudny Ólavsdóttir 1, Sunfríð Johansen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 1, StÍF 4
**Útvísingar:** Stjørnan 1, StÍF 2
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 14 | 13 - 0 - 1 | 406 | 274 | 132 | 26 |
| 2 Neistin | 14 | 11 - 0 - 3 | 384 | 282 | 102 | 22 |
| 3 VB | 13 | 10 - 0 - 3 | 366 | 265 | 101 | 20 |
| 4 Kyndil | 13 | 7 - 1 - 5 | 263 | 300 | -37 | 15 |
| 5 VÍF | 14 | 7 - 0 - 7 | 342 | 352 | -10 | 14 |
| 6 StÍF | 14 | 3 - 1 - 10 | 315 | 355 | -40 | 7 |
| 7 Søljan | 14 | 3 - 0 - 11 | 259 | 361 | -102 | 6 |
| 8 Tjaldur | 14 | 0 - 0 - 14 | 279 | 425 | -146 | 0 |